Dátueftirlitið

Umhvørvisstovan
Postbox 2048
Traðargøta 38
165 Argir

us@us.fo

Tórshavn: 7. juli 2021
J.nr: 21/12774-9
Málsviðgeri: KTH

**Viðvíkjandi almannakunngerð av p-tølum á tinglysing.fo**

Dátueftirlitið hevur viðgjørt fráboðan um trygdarbrot frá Umhvørvisstovuni í samband við, at p-tøl eru almannakunngjørd á nýggju talgildu tinglýsingini tinglysing.fo.

**Avgerð**
Almennir myndugleikar kunnu ikki almannakunngera p-tøl uttan so, at myndugleikin hevur fingið samtykki frá tí einstaka.

Dátuábyrgdarin – í hesum føri Umhvørvisstovan – hevur skyldu at seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja, at viðgerð er í samsvari við dátuverndarlógina.

Hóast tað er staðfest, at p-tøl eru almannakunngjørd á nýggju loysnini tinglysing.fo, metir Dátueftirlitið, at Umhvørvisstovan grundað á eina ítøkiliga meting við støði í verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði og slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli, umframt sannlíku váðunum fyri tey skrásettu, hevur sett í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk til tess at tryggja, at p-tøl ikki vóru í tinglýstu skjølunum, sum nú eru almenn á tinglysing.fo.

Dátueftirlitið metir eisini, at tey tiltøk, sum Umhvørvisstovan hevur sett í verk til tess at tryggja, at p-tøl sum eru almannakunngjørd, skjótt og lætt kunnu takast niður, eru nøktandi.

Dátueftirlitið metir harumframt, at tey tiltøk, sum Umhvørvisstovan hevur sett í verk til tess at tryggja, at p-tøl framyvir ikki eru í skjølum, sum verða tinglýst, eru nøktandi.

Tað er týdningarmikið, at teir persónar, sum eru fevndir av trygdarbrotinum, verða kunnaðir um brotið.

Sambært § 70, stk. 4 í dátuverndarlógini gevur Dátueftirlitið tí Umhvørvisstovuni kravboð um at kunna tey skrásettu, sum ikki sjálvi hava fráboðað, at teirra p-tal er vorðið alment. Dátueftirlitið heitir harumframt á Umhvørvisstovuna um at kunna alment á heimasíðuni um trygdarbrotið og møguligar váðar fyri skrásett í hesum sambandi.

Dátueftirlitið heitir á Umhvørvisstovuna um at syrgja fyri, at skrivligar mannagongdir eru tøkar, sum áseta handfaringina av nýggjum skjølum, sum verða latin til tinglýsingar, og sum skulu tryggja, at hondskrivað p-tøl framyvir verða strikað, áðrenn skjølini verða løgd á tinglysing.fo. Dátueftirlitið

Dátueftirlitið

vísir á, at slíkt yvirlit yvir ítøkilig mál í sær sjálvum sannlíkt er fevnt av dátuverndarlógini, og tí skal viðgerast í samsvari við hana.

**Málsgongd**
Talgilda tinglýsingin tinglysing.fo var verksett mánamorgunin 21. juni 2021. Á tinglysing.fo fær almenningurin uttan innritan atgongd til tingbókarváttanina, tó ikki upplýsing um keypspeningin. Við innritan fær almenningin atgongd til keypspeningin og øll skjøl í tinglýsingaraktini. Innritan fer fram við samleikanum.

Aktirnar eru skannaðar í síni heild. Aktirnar innihalda øll skjøl, sum vóru í aktini, tá aktin varð skannað. Aftaná skanning eru skjøl ikki tikin úr aktunum. Nýggj skjøl verða leypandi skannað og gjørd atkomulig fyri almenninginum.

22. juni 2021 fekk Dátueftirlitið eina fráboðan um trygdarbrot frá Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan greiddi frá, at tey høvdu fingið fráboðanir frá borgarum um, at hondskrivað p-tøl vóru í nøkrum av tinglýstu skjølunum, sum nú vóru atkomulig á internetinum.

Umhvørvisstovan greiddi í fráboðanini um trygdarbrot eisini frá, at sambært tinglýsingarlógini skulu øll heimildarskjøl og pantibrøv viðvíkjandi føstum eigindómi, sum verða fráboðað til tinglýsingar, skjótast gjørligt gerast atkomulig hjá almenninginum. Tinglysing.fo hevur við sær, at upplýsingarnar eru atkomuligar hjá øllum umvegis internetið.

Sum heimild fyri viðgerðini, undir hesum at upplýsingar verða atkomuligar á internetinum, hevur Umhvørvisstovan víst á § 50, stk. 1 og § 50c, stk. 1 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014. Heimildin fevnir ikki um at gera p-tøl alment kend, sbr. m.a. serligu viðmerkingarnar til § 9, stk. 3 í tinglýsingarlógini, sbrt. løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014.

Umhvørvisstovan greiddi eisini í fráboðanini frá, at tinglýsingin síðan 1. januar 2015 hevur havt heimild at krevja p-tal í samband við tinglýsing. Áðrenn 1. januar 2015 var einans krav at upplýsa føðingardagin. Hetta merkir, at skjøl, sum eru tinglýst áðrenn 1. januar 2015 í stóran mun ikki innihalda upplýsingar um p-tøl.

Umhvørvisstovan hevur upplýst, at maskinskrivaði p-tøl eru strikað automatiskt, men at hondskrivað p-tøl kunnu vera eftir.

Í fráboðanini um trygdarbrot hevur Umhvørvisstovan greitt frá váðametingini, sum er gjørd í samband við verkseting av tinglysing.fo og teimum trygdartiltøkum, sum vóru sett í verk í samband við fyrireikingina av talgildu tinglýsingini, fyri at tryggja, at p-tøl ikki vóru í skjølunum.

Umhvørvisstovan hevur í tí sambandi m.a. upplýst, at:

- Maskinskrivað p-tøl eru strikað automatiskt.
- Hondskrivað p-tøl eru strikað í tann mun tað hevur borið til at finna tey automatiskt.
- 3 stakroyndir eru gjørdar. Hesar fevndu hvør um 200 skjøl. Fyrsta stakroynd vísti, at p-tøl vóru í uml. 15 % av skjølunum, næsta stakroynd vísti 5 % og triðja stakroynd vísti uml. 2 %.
- Pilotverkætlan hevur verið í gongd síðan oktober 2020. Í hesi verkætlan hava peningastovnarnir og Búnaðarstovan havt atgongd til eina royndarskipan treytað av, at tey

Dátueftirlitið

boðaðu frá, um tey funnu p-tøl. Endamálið var at staðfesta vavið av p-tølum, sum ikki vóru strikað. Fáar fráboðanir um p-tøl hava verið í pilotverkætlanini.

- Tinglysing.fo er ment soleiðis, at tað er ómakaleyst at boða frá, tá ið p-tøl verða funnin.
- Fráboðanin verður send í serskildan teldupostkassa hjá tinglýsingini.
- Amboð er ment til at strika p-tøl.
- Tað er skjótt at taka skjalið niður, strika p-talið og koyra tað upp aftur. Øll starvsfólk á tinglýsingini duga at nýta amboðið.
- Innanhýsis mannagongdir eru um eftirlit við teldupostkassa og striking av p-tølum skjótast gjørligt.
- Tinglýsingin hevur heitt á peningastovnarnir um ikki at senda skjøl við hondskrivaðum p-tølum til tinglýsingar.
- Skjøl við hondskrivaðum p-tølum, sum verður latin til tinglýsingar, verða framyvir skrásett, so tað er lætt at finna tey fram aftur fyri at tryggja, at p-talið er strikað, áðrenn skjølini verða almenn á tinglysing.fo.

24. juni 2021 høvdu Dátueftirlitið og Umhvørvisstovan fund um málið.

Á fundinum upplýsti Umhvørvisstovan m.a. at kanna var við veitaran, um tað bar til at lesa hondskrivað p-tøl automatiskt. Veitarin, sum er sami veitari, sum stóð fyri talgildingini av donsku tinglýsingini, kundi ikki bjóða slíka loysn. Umhvørvisstovan upplýsti, at um øll p-tøl við vissu skuldi strikast hevði hetta tí kravt eina manuella gjøgnumgongd av øllum skjølunum. Grundað á eina leyslig meting við støði í tíðini, sum var sett av til stakroyndirnar, hevði tað kravt umleið 40 ársverk at hugt øll skjølini ígjøgnum.

Umhvørvisstovan legði á fundinum stóran dent á, at amboð er ment til tess at tryggja, at p-tøl skjótt verða strikað um so er, at hesi eru blivin almenn.

Á fundinum greiddi Umhvørvisstovan frá, at eingin loggur er á skipanini. Grundgevingin er, at talan er um almennar upplýsingar, og tað tí ikki er orsøk at hava eftirlit við, hvør hyggur eftir hvørjum. Av somu orsøk ber ikki til at siga, hvussu nógv hava sæð eitt ávíst p-tal, sum er almannakunngjørt í skipanini.

Dátueftirlitið vísti á fundinum á ásetingina í § 48 í dátuverndarlógini, sum ásetur, at skrásett í ávísum førum skulu fráboðast um trygdarbrot. Umhvørvisstovan upplýsti, at tey enn ikki høvdu kunna tey skrásettu um trygdarbrotið.

Sum uppfylging uppá fundin sendi Umhvørvisstovan Dátueftirlitinum hagtøl sum vístu, at frá 21. juni til og við 24. juni vóru tilsamans 37 fráboðanir komnar um at egið p-tal ella p-tal hjá makanum var í skjølunum, og 30 fráboðanir frá triðjapersóni um p-tøl, sum vóru í skjølunum. Tað merkir í alt 65 fráboðanir.

**Lóggáva**
Dátueftirlitið hevur viðgjørt málið sambært løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

Sambært § 16, stk. 1 í dátuverndarlógini kunnu almennir myndugleikar viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking ella sum skránummar. Sambært stk. 4 fevnir henda áseting ikki um at gera persónstalið alment kent. Til tað krevst samtykki frá skrásetta.

Dátueftirlitið

Sambært § 37 í dátuverndarlógini skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja og kunna vísa á, at viðgerð er í samsvari við løgtingslógina. Dátuábyrgdarin skal í hesum sambandi leggja upp fyri slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini umframt váðum fyri rættindini hjá skrásetta.

Sambært § 46, stk. 1 í dátuverndarlógini skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini. Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu í hesum sambandi hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði og slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli, umframt sannlíku váðunum og álvarum fyri rættindi hjá einstaklingum. Í metingini av, um trygdarstøðið er hóskandi, skulu, sambært § 46, stk. 2, serlig atlit takast til teir váðar, sum standast av viðgerðini, herundir serliga møguleikanum fyri, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar ella minka í virði ella at óviðkomandi fáa kunnleika til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær.

Sambært § 47, stk. 1 í dátuverndarlógini skal dátuábyrgdarin boða Dátueftirlitinum frá broti á persóndátutrygdina uttan óneyðugt drál og um gjørligt innan 72 tímar eftir, at hesin er vorðin kunnugur við brotið. Sambært stk. 4 skal fráboðanin m.a. lýsa av slag av broti á persóndátutrygdina, her undir so vítt møguligt sløgini og umleið hvussu nógv skrásett hetta fevnir um og eisini sløgini og umleið hvussu nógvar skrásetingar av persónupplýsingum talan er um, lýsa sannlíkar avleiðingar av brotinum, lýsa tey tiltøk, sum dátuábyrgdarin hevur sett í verk ella mælir til, fyri at handfara brotið.

Sambært § 48 í dátuverndarlógini skal dátuábyrgdarin uttan óneyðugt drál boða skrásetta frá um brotið, um brotið eftir øllum at døma hevur við sær stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum. Sambært stk. 3 er ikki neyðugt at boða skrásetta frá brotinum um dátuábyrgdarin hevur sett í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, og hesi tiltøk eru nýtt til tær persónupplýsingar, sum brotið fevnir um, um dátuábyrgdarin hevur sett í verk eftirfylgjandi tiltøk, sum tryggja, at stóri váðin fyri rættindi hjá skrásetta, sbrt. stk. 1, sannlíkt ikki longur er til staðar, ella um tað krevur eitt ósamsvarandi arbeiði.

Sambært § 70, stk. 4 kann Dátueftirlitið geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fremja tøknilig og bygnaðarlig, herundir fysisk, trygdartiltøk, so at bert viðgerð fer fram, sum hevur heimild í løgtingslógini, og so at persónupplýsingar ikki ólógliga forkomast, missast ella skerjast, og at tær ikki koma óviðkomandi til kunnleika ella verða misnýttar.

Í § 71, stk. 1 er ásett, at Dátueftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum eru av týdningi fyri virksemið hjá eftirlitinum.

Sambært § 76 kann skrásetti klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum viðvíkjandi honum.

Avgerðir hjá Dátueftirlitinum eru sambært § 72, stk. 1 endaligar innan fyrisitingina.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen